## Stóra Bretland vann sannførandi móti Turkalandi

Seinna mótstøðuliðið hjá Føroyum verður U21 liðið hjá Turkalandi. Turkaland fekk ein ordans hvøkk, tá tær taptu stórt móti vertunum úr Stóra Bretlandi. Stóra Bretland vann sannførandi 22-13. Tíverri fyri vertirnar mugu teir verða FCK leikaran Michella Skovgaard fyri uttan móti Lettland, eftir at hon fekk ein knæskaða í dystinum. Óvist er, um hon verður við móti Føroyum leygarkvøldi.



# Taktikkfundur í Litava



Egil á Bø, liðformaður hjá EB/Streymi, í dysti móti Manchester City

**Egil á Bø og hinir EB/Streyma spælararnir hava á landsliðsferðini eisini havt stundir at tosa um spennandi uppgávuna á Skála**

EB/STREYMUR
*Jákup Mørk*
*jakup@sosialurin.fo*

Í kvøld klokkan seks fara teir í EB/Streymi at hava síðstu venjingina, áðrenn teir sunnudagin fara at vitja á Skála.

Landsliðsspælararnir Egil á Bø, Arnbjørn Hansen, Bárður Olsen og Leif Niclasen fara at hitta liðfelagarnar fyri fyrstu ferð, síðani teir mikudagin í síðstu viku fóru undir landsliðsuppgávurnar.

- Vit fegnast sjálvandi um, at landsliðsvenjarin sendir boð eftir fleiri av okkara spælarum. Men tað er einki at liggja omaná, at tað órógvar venjingarnar hjá liðfeløgunum, at fleiri av spælarunum ikki hava møguleika at møta, staðfestir Egil á Bø, sum er liðformaður hjá EB/Streymi, og sum hesar seinastu ferðirnar hevur verið verjuálit á landsliðnum.

Hóast fokus hevur verið á landsldystunum, so hava teir í EB/Streymi eisini tosað um spennandi avbjóðingina, sum stendur fyri framman hjá teirra felagi:

- Vit eru allir fullgreiðir yvir, at tað fyrst og fremst ræður um at fokusera rætt. Um vit fara at hugsa um meistaraheiti og alt annað í tí sambandi, so fer tað ikki at ganga. Vit mugu fokusera upp á, at tað er stór avbjóðing at spæla ímóti Skála, og at tað eru vit, sum hava strítt okkum til ta støðuna, sum vit nú eru í. Um vit megna tað, so ivist eg ikki í, at vit sjálvir vera førir fyri at vinna tað úrslitið, sum skal til fyri at vinna FM sunnudagin, staðfestir Egil á B, liðformaður hjá EB/Streymi.

# Gummi skal skiftast út við gull

**Um EB/Streymur sjálvt skal avgera meistarastríðið, tá ið sundalagsmenn fara at vitja niðurflutta Skála, so verður neyðugt sinniliga at savna seg meiri um uppgávuna, enn tað hevur eydnast seinastu ferðirnar**

SKÁLA-EB/STREYMUR
*Jákup Mørk*
*jakup@sosialurin.fo*

Fer tað sunnudagin at eydnast EB/Streymi at tryggja sær fyrsta FM heitið nakrantíð og harvið eisini fyrstu greipuna nakrantíð. Tað er stóri spurningurin undan næstsíðsta umfarinum.

EB/Streymur hevur longu havt tveir møguleikar at tryggja sær FM heitið, men sera áhugaðu og trúgvu viðhaldsfólkini hjá teimum í Sundalagnum hava verið noydd at bíða í tolni og við ikki sørt vaksandi órógvi.

Í Runavík endaði tað 2-2, og tá ið síðsta stigið skuldi fáast til høldar á heimavølli, varð úrslitið 5-4 tap ímóti B36, sum allan 2. hálvleiki var undirmannað.

Nú er triði og næstsíðsti møguleikin hjá EB/Streymi at tryggja sær FM heitið. Trúgva áskoðarafjøldin fer sunnudagin úr Tjørnuvík, Vík, Streymnesi, Saksun, Hvalvík, Hósvík, Kollafirði, Oyri, Oyrabakka, Norðskála, Svínáum, Ljósá, Eiði, Gjógv, Funningi og so nógva aðra staðni frá og inn á Skála.

Tað er longu greitt, at heimaliðið næsta kappingarár fer at spæla í næstbestu deildini. Men skálamenn ætla sær at fara úr bestu deildini við røttum ryggi.

- Tað hevur týdning fyri okkum og viðhaldsfólkini, at vit geva tað, sum vit eru førir fyri, í síðsta heimadystinum á hesum sinni, hevur Skála venjarin, John Petersesn, sagt.

Í síðsta umfari fer EB/Streymur at fáa vitjan av HB. Um HB tá fer at hava møguleika at vinna FM valdast, hvussu tað fer at ganga hjá teimum í lokaluppgerðini í Gundadali sunnudagin.

Men í EB/Streymi vilja tey ógvuliga fegin hava, at FM spurningurin verður svaraður nú sunnudagin. Tey hava einki ímóti at sleppa undan spenninginum - og vónbrotinum - fyri tveimum árum síðani, sum tey minnast aftur á.

Uppskriftin upp á at vinna stig á Skála er uppløgd hjá teimum í EB/Streymi: Tað er fyrst og fremst í høvdinum á monnunum, sum fyrr í summar hava víst avrik og vunnið stigini, ið bóru sannførandi oddasess við sær, at sigurin skal vinnast.

Ampin av møguleikanum at tapa og kiksa hevur spøkt og síðani verið sjónskur. Takið hjá Sigfríði Clementsen hevur hesar báðar vikurnar, meðan landsdystirnir hava verið á skránni, verið at fáa sínar menn at fokusera rætt soleiðis, at teir á Skála bara hugsa um uppgerðina og ikki um gullkrónur og steyp. Um tað fer at eydnast, so vera tað ikki gummibeinini, men heldur gullkrónurnar, ið fara at verða umrødd seint seinnapartin sunnudagin.

John Petersen hevur havt allar sínar menn tøkar tvær tær seinastu vikurnar. Tað hevur Sigfríður Clementsen ikki havt. Ein prísur fyri at vera topplið er, at fleiri spælarar hava fingið landsliðsboð. Egil á Bø, Leif Niclasen, Bárður Olsen og Arnbjørn Hansen hava verið upptiknir av landsliðnum síðani næstsíðsta mikudag. Saman við liðfeløgunum fara teir í kvøld at leggja síðstu hond á fyrireikingarnar til Skála ferðina.

René Tórgarð var burtur í landsliðsørindum í síðstu viku, men hann var ikki við í Litava.

Miðvallarin Mikkjal Thomassen noyddist longu í 1. hálvleiki skaddur av vøllinum leygardagin, tá ið Føroyar høvdu vitjan av Eysturríki. Hann er leikbannaður sunnudagin.